

*Henry Anderton, sum hevur selt Bjarka Højgaard Vaila, er her á veg út á oynna*

av teirra royndum. Veruliga støðan í Hetlandi hvat oljuvinnuni viðvíkur er jú tann, at hetlendingar eru við sviðið soð, meðan stóru oljufeløgini fara avstað við vinninginum av oljuævintýrinum.

### Initiativ og dynamikkur

Bjarki Højgaard ivast ikki í, at hetlendingar sjálvir eru sera hugaðir at koma í nærri samband við føroyingar bæði á tí búskaparliga og tí mentanarliga økinum.

— Hvat viðvíkur tí búskaparliga, so tykist sum tørvur er á bæði initiativi og dynamikki í Hetlandi og her hava vit so kanska nakað at lata teimum. Tí tykist tað vera ov mikið av her á landi.

Bjarki heldur, at hetlendingar hava líka stóran áhuga í at gerast minni bundnir av Stórabretlandi eins og vit av Danmark.

— Eg haldi bæði vit føroyingar og íslendingar hava nógv at bjóða hetlendingum og við at koma í samband við teir hava vit ikki bert atgongd til hetta lítla oyggjasamfelag, men er tað eisini tað sama sum at lata dyrnar upp til Bretlands og víðari inn á meginlandið. Samanumtikið eru nógvir møguleikar við øktum samstarvi millum Føroyar og Hetland, heldur Bjarki Højgaard, sum ætlandi í framtíðini fer at brúka ein part av arbeiðsorku síni júst í Hetlandi.

Hann vísir so eisini á, at dialogurin millum føroyskar og hetlendskar politikarar er nógv øktur í seinastuni, ikki minst orsakað av felags áhugamálum sum eitt nú útbygging av Dounreay-verkinum í Norðurskotlandi, sum eisini hetlendingar vilja hava steðgað.

### Skrivstovu í Lerwick

At umræddu ætlanir hjá Bjarka Højgaard ikki eru luftkastellir, vísa tær iløgur, sum fyritøka hansara er við at gera í Lerwick.

— Vit eru í ferð við at keypa høli til skrivstovu í Lerwick, sum so verður karmurin um okkara virksemi í Hetlandi í framtíðini. Hetta virksemið verður so umframt at umsita Vaila og Vaila Hall, eisini at fara undir bygging, handla við sølu og keyp av ognum o.a., sigur Bjarki Højgaard at enda.

**jan**

# Sveinaroynd í húsasmiðyrkinum

Lærurráðið skipaði samsvarandi løgtingslóg um lærlingaviðurskifti í farnu viku fyri sveinaroynd fyri húsasmiðir (timburmenn) á Tekniska Skúlanum í Klaksvík.

Sveinaroyndin fevnir um eina *tekniroynd* uppá 8 tímar og eina *verkliga* roynd uppá 4 dagar.

Royndaruppgávan hesaferð var: *»Dragaraverk við 4 kop-bondum«.*

Tekniroyndin verður gjørd í mátinum 1:10.

Verkliga arbeiðið verður gjørt eftir tekningini í fullari støddd úr sag-skornum timburi.

Allir lærlingarnir (sí hjálagda yvirlit yvir lærlingar og læruplóss) stóðu royndina.

Skoðanarmeistararnir vóru: Jens Juel Sólbjørg (meistaraumboð) og Páll Sólbjørg (handverkaraumboð).

Nýggju sveinarnir eru hesir: Hans Peter Andersen, Saltangará, læruplóss: Haldur Vang, Toftir.

Dia Marner Davidsen, Runavík, læruplóss: Karl Johannesen, Saltangará.

Kaj Dam, Klaksvík, læruplóss P/f Húsasmíð, Klaksvík.

Óli Constantin Kalsø, Klaksvík, læruplóss: Klaksvíkar Byggivirki.

Poul Eli Jacobsen, Klaksvík, læruplóss: Klaksvíkar Byggivirki.

Hans Elias Højgaard, Klaksvík, læruplóss: Klaksvíkar Byggivirki.

Jóhannes Martin Poulsen, Klaksvík, læruplóss: Klaksvíkar Byggivirki.

*Luis Palau:*

*Týðing: p. av Lofti*

# Endurtak lyfti Guds

Nú hevur tú lisið, granskað, roynt at minnast og grundað á ymisk skriftstøð í Bibliuni. Hvat tykir tær var torførast hjá tær at trúgva?

Spádómunum, frásagnunum, trúfrøðiligu pørtunum? Ella lyftum Guds? Hjá mongum trúgvandi eru lyfti Guds størsti trupulleikin. Jú, tey eru ein fragd fyri oyrað, og av og á eru tey okkum til hjálpar, men kortini hugsa vit: Halda tey, tá ástendur? Og uttan at vita av, spyrja vit okkum sjálvi, um Gud heldur lyfti síni.

Í sannroyndum áliti segði D.L. Moody: »Gud gav ongantíð eitt lyfti, sum var ov gott til at vera satt«. Hugsa um hetta. Í Jósva 21,45 lesa vit: »Ikki eitt svitast av øllum hinum góðu orðum, sum Harrin hevði talað við hús Ísraels, tað gekk út alt samalt«. Samanber við Josva 23, 14-15. Salomon sigur seinni í 1. Kongabók 8,56: »Lovaður veri Harrin, sum hevur givið Ísrael fólki sínum frið, soleiðis, sum hann lovaði. Ikki eitt orð hevur svitast av øllum hinum góðu orðum, ið hann talaði við Mósesi tænara sínum«.

Ongi av lyftum Guds hava svitast. Hitt einasta óbroytiliga vit kunnu boða, er tað, sum Gud hevur sagt. Biblian boðar nakað, ið er meira enn tað, ið vit kunnu vita ella læra — undantikið við opinbering Guds.

Í orðum sínum hevur Gud fleiri ferðir givið fólki sínum »Hini størstu og dýrastu lyfti«. (2. Pætursb. 1,4).

Nøkur av lyftum hansara vóru á serstakan hátt givin einum persóni (Jósva 14,9), einum bólki (5. Mósebók 15,16), eini tjóð (Haggai 1,13). Vit eiga at ansa eftir, at vit ikki leggjast á lyfti, sum eru ætlað øðrum.

Lovaður veri Gud fyri, at mong lyfti í Gamla Testamenti eru endurtikin í Nýggja Testamenti, og at tey eru fyri okkum í dag.

Lyfti Guds til Josva var, at hann ongantíð fór at sleppa ella fara frá honum (Josva 1,5). Í Hebrearabrævinum gevur Gud hetta sama lyftið til okkum trúgvandi.

Charles Spurgeon segði: »Menniskja, eg biði teg. Far ikki við lyftum Guds, sum vóru tey ætlað eini forngripagoymslu, men trúgv teimum og nýt tey«. Vit ogna okkum lyfti Guds við at læra tey við granskan og umhugsan, og við at gera okkum sjálvum greitt, at vit hava tey fyri neyðini, og við at geva Gudi høvi at minna okkum á lyfti síni í gerandistørvi okkara.

J.I. Pacher segði: »Gud lærir hin trúgvandi at virðismeta lyfti Sini, við at lata hann bíða eftir teimum og áhaldandi biðja um tey, áðrenn hann fær tey«.

Gud hevur givið tað lyfti, at hann skal hjálpa okkum í tørvi okkara. Men vit mugu biðja um, at hann skal koma okkum til hjálpar. Jesus sigur: »Biðið og tykkum skal verða givið. Leitið, so skulu tit finna. Bankið uppá, so skal tykkum verða latið upp«. (Matt. 7,7).'

»Hvat tit so biðja um í navni Mínum, skal Eg gera, fyri at Faðirin skal verða dýrmætur við Soninum«. (Jóh. 14,13), (2. Kor. 1,20).

Hvør er størsti tørvur tín í dag? Gud hevur givið lyfti um at hjálpa tær í hesum tørvi. Lít á lyftisorð hansara.


## Ársaðalfundur

og fyrsti uppstillingarfundur til løgtingsvalið verður í bygdarhúsinum í Kollafirði mánadagin 14. mars kl. 20.00

**Nevndin**

## Suðuroyar Sjúkrahús

**800 Tvøroyri**

Søkir fylgjandi starvsfólk til frítíðaravloysan, í niðan fyri standandi tíðarsekiðum:

**Sjúkrasystrar** til seingjadeildina frá 1/6—30/9-1988

**Sjúkrahjálparum** til seingjadeildina frá 1/6—30/9-1988

**Sjúkrasystrar** til opr./røntgendeildina frá 9/5—30/9-1988

**Narcosusjúkrasystir** 1/7—30/8-1988

Umsóknir við avritum av prógvum v. m. verða at senda til Fyristøðukvinnuna, Suðuroyar Sjúkrahús, 800 Tvøroyri.